## Jacklin um EM í hondbólti hjá monnum

Mær dámdi tað ótrúliga væl. Eisini, at Danmark vann. Hans Lindberg og eg eri trímenningar, so tað gjørdi tað eyka stuttligt. Eg haldi, at manshondbólturin er meiri tekniskur nú, og minni rástyrki.



## ... um landsvegin til Vestmanna

Vit kundu gott verið hann fyri uttan. Hann er ikki stuttligur at koyra á um veturin. Tað er gott, at ein hevur ein góðan bil at koyra við. Tí ein má jú røkta familjuna í heimbygdini.

# Vestmenningurin í Kyndli vil hava steypið

**Jacklin Durhuus hevur verið føroyameistari við bæði Kyndli og VÍF. Hon hevur vant og leikt undir Anju Andersen í Slagelse. Men hon er kortini svong eftir at gerast steypavinnari við Kyndli í morgin**

### Ítróttarprofilurin



**Heri Simonsen**
hersim@sosialurin.fo

- At koma í steypafinaluna merkir ALT.

Jacklin Durhuus setir stór orð á steypafinaluna, sum er á skránni í morgin.

- Tað er so ótrúliga nógv fokus, og nógv fjølmiðlaumrøða hendan dagin. Landskappingin hevur langt frá líka nógv fokus. Hóast tað nú eisini er talan um finalur í Landskappingini, sigur hon.

Jacklin veit, at uppgávan ímóti Føroyameistarunum úr Stjørnuni verður stór og møtimikil. Men hon er við gott mót.

- Vit hava ein møguleika ímóti Stjørnuni. Men tað krevur, at vit allar hava ein góðan dag, og at tær í Stjørnuni hava ein minni góðan dag. Men hvussu er og ikki, so eru vit Kyndla-kvinnur ótrúliga stoltar av, at verða komnar í steypafinaluna.

Jacklin er týðiliga stolt av seinnu hálvfinaluni, har tað eydnaðist teimum at seta Tjaldrið av.

- Spælið hjá okkum er bara blivið betri gjøgnum kappingarárið. Vit eru væl betri nú, enn vit vóru í byrjanini.

Stjørnan er ávarðað. Vestmenningurin í Kyndli ætlar at berjast fyri at fáa steypið. Og tí er kanska hóskiligt, at hon hevur funnið sítt heim í Tórshavn í "Berjabrekku". Tann lítli fitti sonurin, Bergur er blíður og prátingarsamur, men hondbóltur sær ikki út til at upptaka smábarnasinni nógv. Enn!

### Kroniska sjúku

Eitt er at berjast fyri sítt lið í hondbólti, og at taka stór tøk ímóti mótstøðuleikarum. Men Jacklin stríðist eisini við eina keðiliga sjúku, nevnliga kroniska tarmsjúku. Kappingarárið í fjør breyt sjúkan út, og tá mátti hon taka eina steðg uppá heilar 6 vikur. Har hon hvørki kundi leika ella venja. Heilivágurin hon má taka ímóti sjúkuni er sterkur lútur, og kemur beinleiðis undir kategoriina "doping". Og er tað soleiðis eisini ein persónligur stongsil frá hondbóltinum.

- Meðan aðrir leikarar kunnu lova seg til at leika eitt kappingarár á gangin, og kanska taka eitt ár í senn. So eri eg noydd til at taka eina ella tvær vikur í senn. Tí eg veit ikki nær kroniska tarmsjúkan brýtur út aftur, sigur hon.

Jacklin hevur upplivað tríggjar ferðir, at sjúkan hevur lagt ein fyribils stoppara á hondbóltsyrkisleiðina. Hetta setur óivað steypafinaluna í eitt serligt perspektiv, størri enn hjá hinum leikarunum, sum koma at leika í finaluni í morgin.

### Byrjaði um 9 ára aldur

Um 9 ára aldur byrjaði Jacklin at leika hondbólt. Hondbóltur í yngru deildunum var ikki so væl skipaður tá. Orðið "Minihondbóltur" hevði ikki vunnið innpass í Føroyum síðst í áttatiárunum. Men tá helst størsta hondbólts-guruin í søguni hjá VÍF, Lars Nedergaard var høvuðsvenjari hjá VÍF, árini 1993-96 fekk ungdómsarbeiðið eina heilt nýggja dimensjón.

- Lars var ótrúliga góður at dyrka talentini. Sjálvt um tað kanska gekk eitt sindur út yvir tey, sum vóru minni góð. Hann fylgdi okkum allastaðni. Hann kom við til útidystir, fyri at stuðla okkum.

Væl skipaða ungdómsarbeiðið og talentið gingu upp í eina hægri eind, tá Jacklin bleiv Føroymeistari við Gentum 14 ár.

- Tað er einasti FM, sum eg vann í yngru deildunum.

Men Jacklin letur ongan iva verða um, at talan er um eitt kært minni.

### Á besta liðið 15 ára gomul

Gamalt er at siga, at talent forpliktar. Longu 15 ára gomul kom Jackin á besta kvinnuliðið hjá VÍF, sum tá leikti í næstbestu deildini. Hon leikti við VÍF í 1. deild 1996-97. Men tá VÍF fór niður aftur í 2. deild at venda, og tá hon samstundis gekk í skúla í Havn, so valdi hon at taka eitt kappingarár við arvafíggindanum hjá VÍF, Kyndli. Og væl hilnaðist, tær gjørdist Føroyameistarar fyri kappingarárið 1997-98.

- Tað var eitt ótrúliga sjarmerandi lið. Tað var bara málverjin, Hanna Rubeksen, sum átti børn. Vit vóru næstan allar um 18-19 ára aldur. Tað vóru bara Lotte Sørensen, Ann Hansen og Hanna, sum vóru eldri. Vit høvdu tað ótrúliga stuttligt. Vit gingu í biograf, fóru út at eta saman. Tað var ein einastandandi stuttlig tíð.

Jacklin minnist eisini, at hetta var fyrsta árið hjá Lotte Sørensen í føroyskum hondbólti.

- Eg helt hana verða øgiliga. Eftir okkara málstokki var hon ræðuliga góð.

Sum so mong onnur í Kyndli viðurkennir Jacklin tað stóra ungdómsarbeiðið, sum Lotte gjørdi fyri felagið, og undirstrikar, at tað er saknur í henni í Kyndli.

### Føroyameistari við barndómsfelagnum

At blíva Føroyameistari er altíð gott. Men at gerast Føroyameistari við barndómsfelagnum er nakað serstakt. Kappingarárið 2001-2002 eydnaðist tað loksins VÍF-kvinnunum at gerast FM-vinnarar. Tað gjørdist næsta meistaraheitið hjá Jacklin.

- Tað liðið má verða eitt tað besta kvinnuliðið, sum hevur spælt í Føroyum við Manuelu Stan, Nicoletu Radu, Ionu Rapa, Sóley Mikkelsen, Randi Kúrberg og Alice Høghamar.

Jacklin heldur, at tað var ein stórur lætti hjá kvinnunum at koma úr skugganum hjá monnunum, sum hava verið FM-vinnarar so ofta. Ein virðing vaks fram, sum ikki hevði verið har áður. Nú lá meiri ræðið fyri at fáa klæðir, skógvar og ein góðan sponsor.

- Tá ein vinnur, er slíkt alt léttari.

VÍF-kvinnurnar tóku av avbjóðingini at melda til Evropa Cup fyri meistaralið. Báðir dystirnir ímóti hollendska liðnum Hellas vóru leiktir í Føroyum, og tær í VÍF

## Fakta

**Navn:** Jacklin Jógvansdóttir Durhuus
**Fødd:** 21. januar 1980
**Bústaður:** Berjabrekka 171 í Tórshavn
**Børn:** Bergur 3 ár
**Feløg:** VÍF, Kyndil og Slagelse